## Gera seg inn á bussar

Í seinastuni hava fleiri herverk verið ímóti bussum í Danmark, og løgreglan sigur seg vera sannførda um, at talan er um skipað herverk, og at tað eru harkalið úr londum í Eysturevropa, sum fremja tey. Brotsmenninir bróta inn í bussarnar um næturnar og stjala teldur, flatskíggjar og aðra tøkni, sum teir taka við sær av landinum. Løgreglan hevur fingið serliga nógvar fráboðanir frá busseigarum á Suðursælandi og á Lollandi-Falster.



## Icelandair broytir rutu

Íslendska flogfelagið Icelandair hevur gjørt at fara undir rutuflúgving til Toronto í Kanada í mai næsta ár, men samstundis hevur felagið gjørt av at strika flúgvingina til Baltimore í USA úr ferðaætlanini. Leiðslan í Icelandair sigur, at ferðafólkatalið á rutuni til Baltimore minkaði nógv, tá amerikanska herstøðin í Keflavík bleiv niðurløgd. Íslendska felagið fer at økja flúgvingina til Bretlands næsta ár, men til Danmarkar verðir sama útboð sum í ár.

# Milliónagáva til gransking



**Sparebank 1 í Norður-Noregi hevur latið tríggjar milliónir krónur til gransking við tí endamáli at fáa kanna, hvussu sjómatur kann fyribyrgja lívsstílssjúkum**

GRANSKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Alsamt fleiri fólk stríðast við lívstílssjúkur. Fiskeriforskning í Tromsø hevur tí í fleiri ár granskað í samanspælinum millum sjómat og heilsu. Nú hevur granskingarumhvørvið fingið stórfingnað gávu frá Sparebank 1 Nord Norge. Henda skal brúkast at menna granskingina innan sjómat og heilsu í arktiska økinum. Endamálið hjá Sparebank 1 við at lata pengar til gransking er at hækka førleikan á hesum økinum og at fáa fleiri vitunararbeiðspláss í Tromsø.

Asbjørn Gildberg granskari á Fiskeriforskning vísir á, at ábendingar eru um, at eisini fiskaprotein hevur sera góðar eginleikar, møguliga á sama hátt sum fiskafiti. Hetta verður nú kannað nærri, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínu.

*Milliónagávan skal skunda undir gransking fyri at kanna, hvussu sjómatur kann fyribyrgja lívsstílssjúkum*

# Fartelefonin var ikki stolin

**Ein maður var í morgun fríkendur fyri at hava stolið eina fartelefon. Føroya Tele hevði annars melda mannin fyri stuldur**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt mál um eina fartelefon fekk drúgva viðgerð í rættinum í morgun.

Ein maður, sum starvaðist hjá Føroya Tele í Miðvági, sat skuldsettur fyri at hava stolið eina fartelefon frá arbeiðsgevara sínum. Sakin gekk í stuttum út upp á, at viðkomandi starvsmaður hevði tikið eina fartelefon úr Telebúðini, sum konan síðani nýtti. Eskjan, sum telefonin var í, lá kortini eftir í Telebúðini, og umvegis skrásetingina á hesi ber til at staðfesta, hvør nýtir telefonina.

Ákærdi segði seg eisini hava lagt ein lepa við, har hann greiddi frá, at tað var hann, sum hevði tikið fartelefonina, men hesin lepin kom eftir øllum at døma ongantíð fyri eyguni á nøkrum øðrum í Telebúðini, og so var gjørt av at melda, og maðurin fekk sekkin.

Men dómarin helt ikki tað var prógvað, at maðurin ætlaði at stjala fartelefonina, serliga tí, at hann hevði latið eskjuna staðið eftir í handlinum, og tí maðurin visti, at telefonin lættliga kundi sporast umvegis eskjuna. So maðurin varð fríkendur.

Føroya Tele kundi kanska havt kravt mannin eftir teimum 800 krónunum, fartelefonin kostaði, men fyritøkan metti eftir øllum at døma málið so týdningarmikið og prinsipielt, at teir í staðin valdu at koyra manin úr starvi og melda hann fyri stuldur.




*Maðurin varð fríkendur fyri at hava stolið eina fartelefon til 800 krónur.*

## Ímóti ørvitistunlum

**Stigtakarnir til mótmælisskrivið móti Sandoyartunlinum eru ímóti, at ørvitistunlar verða raðfestir fram um eitt nú játtan til skúlaverkið og skúlabygningar**

MÓTMÆLI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Mótmælisskrivið móti Sandoyartunlinum, sum Hans Blåsvær í Havn hevur tikið stig til, er at síggja á heimasíðuni http://www.gopetition.com/online/15622.html

Har verður sagt, at málið er Føroya Løgting, og so verður fyrst og fremst víst til uppskotið um Sandoyartunnilin við leinkju til uppskotið á heimasíðuni hjá løgtinginum. Síðani verður sagt, at Føroya løgting hevur í ár samtykt at brúka nærum eina milliard krónur til tunnilsgerð.

- Eingin vón er fyri, at hesir pengarnir kunnu koma aftur við nýtslugjaldi ella á annan hátt, og hetta er okkara tingmanning væl vitandi um, skrivar Hans Blåsvær.

Víðari sigur hann:

- Samstundis enda vit næstan aftast í Pisa kanningunum hvørja ferð, Studentaskúlin í Hoydølum er ein ruin, og játtanin til Fróðskaparsetur Føroya er skorin niður frá at vera láturlig til at vera syndarlig.

Úrslitið verður, at vit í 2015 fara hava verðsins besta tunnilsverk, men ongan eftir sum hevur ráð ella vit til at koyra ígjøgnum.

Undirritaðu vilja við hesum mótmæla, at alt Føroya ríkidømi verður brúkt til at bora hol við.